Framhald av síðu 2

hvørt ein 10 metra leingjan stoypt á staðnum, ella leingjan við 15×15 metra kistu setta á 7—8 metra dýpi.

Uttan neyvari metan og útbjóðing letur tað seg ikki gera at áseta kostnaðin av hesum.

Byggiplássið er hitt torførasta, ið hugsast kann, og arbeiðið kann bert fremjast av allarkønastu og djarvastu kavarum, monnum, ið eru til reiðar at arbeiða við hvørjum amboði í tjóðri og við vanda fyri sjálvir at verða slongdir upp úr ella niður í »forskallingarnar«, tá neyðugt er at arbeiða tey stuttu tíðarbil, hesar kunnu standa. Tað er ikki eitthvørt byggifelag, ið hevur slíkar menn í arbeiði, og er prisurin tí sera óvissur, áðrenn tilboð fyriliggja.

Kistuna er helst lættari at seta, og serliga um meginparturin av grótkastinum verður útlagdur áðrenn.

Leysliga kann metast, at leingjan við 10 metrum á staðnum gerst ikki fyri minni enn 8 mió. kr. og setan av 15 metra kistu ikki fyri minni enn 10 mió. kr.

Minnilutin setir seg ikki fóran fyri at geva endaligt tilmæli viðvíkjandi leingjanini fyrr enn tilboð eru fingin til vega, men mælir til, at fyribils verða avsettar 10 mió. kr. til hetta arbeiðið.

Bøtir helst innsiglingina

Leingjanin hevur somu ávirkan sum grótkastið, at hon helst bøtir um innsiglingina á Pollin, men eftir køna manna metan ávirka hvørki grótkastið ella leingjanin kyrru viðurskiftini inni í sjálvari havnini. Har verða »fortoyningskreftirnar« tær somu og skiparenningin aftur og fram við bryggjusíðu hin sama.

Orsøkin til hetta er, at brotið, sum skapar ókyrru í innsiglingini og tann parturin, sum snarar beint um molaendan og eisini skapar ring innsiglingarviðurskifti bert koma frá einum lítlum parti (3—5%) av teirri vatnmongd, sum ávirka viðurskiftini í havnini.

Annar stórur partur av havalduni, sum setir inn í Skopunnarfjørð, snarar orsakað av streym- og botnviðurskiftum norðanfyri boðan og longri norðanfyri molaendan suðuryvir, soleiðis at tær stóru vatnmongdirnar seta inn á Pollin og í havnina norðan fyri.

Bøtist bert við pierið uttanvert Litlasker

Serfrøðingarnir meta, at hesum bøtist bert fyri við einum pierstubba norðureftir uttanvert á Litlaskeri og við viðkan av Pollinum og grótkasti fram við útnyrðings- og vestursíðuna av Pollinum.

Modelroyndir sýna, at pierur 40—50 metrar langur tekur 3/4 av økyrruni inni í havnini burtur samstundis sum hann veitir skipum livd, meðan tey bíða uttan fyri portrið ella portursopið.

Við so longum pieri sum 50 metrar var ynskjandi, at burturspreingingin norður úr Pollinum var nærum so stór, sum hon tilætlað í projekti V5, men hetta metir landsstýrið eins og undanfarna torført at útvega pening til.

Tá samstundis menn, ið nýta skulu havnina, eru trekir við at fáa sett upp í skersendan, er helst skilagott at taka minni tilo. Hetta letur seg gera, ti her kemst aftur umaftur, hvat ikki er lætt viðvíkjandi útspreingingini.

Minnilutin mælr tí til í fyrstu syftu bert at seta 25 metrar upp í uttanvert á Litlaskeri, soleiðis at hesir eru framhald av ytra brimgarðinum um havnina. Tá útsprongt er, er siglingarviddin norð í Pollin úr hesum pierstubba 85—90 metrar og plássið dupult so stórt sum nú.

Millum henda nýggja »skersenda« og molan á Bergi eru á 75 metrar (70 metrar, um hann verður longdur 15 metrar) og 80 metrar inn til landssíðuna norðan fyri Oksaklett.

Mett er, at 25 metrar uttanvert skersendan kosta 10 mió. kr., men tá er eisini brimgarðurin longdur norður áraka verandi »skersenda« og uppfylt innanfyri.

Fyrimunurin við hesi loysn er, at rættiliga skjótt sæst, um pierur út frá Litlaskeri bøtir tað, sum modelroyndirnar vístu, og menn kunnu tá taka støðu til at leingja 10—15 metrar afturat, sum serfrøðingarnir meta er betra loysnin. Slík leingjan saman við eini møguligari leingjan av molanum norðuri á Bergi 10—15 metrar er tá eisini eitt øðrvísi samspæl imillum enn tað landsstýrið hevur mælt til, og verða fortreytirnar fyri staðutøku betri, tá 24 metrar eru komnir uppi á Litlaskeri.

Eingin havnagerð eftir meirilutauppskotinum

Uppskot meirlutans ber onga havnagerð í Skopun í sær. Sum ávist frammanfyri gerst eitt grótkast uttan fyri molan á Bergi og leingjan av honum ikki fyri minni enn 13—15 mió. kr. Tað vil siga, at málið skal eina ferð enn fyri tingið, og hetta kann í fyrsta lagi verða á ólavsøku, tá verður ov seint at byrja í ár.

Vandi er hartil fyri, at menn fara at meta slíka bygging sum endaligu loysnina, ti nú hava vit jú »portrið«. Hendir tað, at bíðað verður eftir prógvi fyri, at portrið loysir tað uppgávu, sum pierstubbin úr Litlaskeri skal loysa, so hava sandoyggjafólk fingið eina loysn, tey ikki kunnu verða nøgd við, ti tá er ikki trygd fyri regluligari samferðslu við bilferju, og trygg lega ikki útvegað trolarum og bátum, sum skulu landa til »Solaris«.

Portrið hevur sínar stóru fyrimunir, men viðurskiftini í vetur hava vist, at trygga legu eiga skipini ikki, eins og tey eru í vanda fyri at verða innistongd. Hartil kemur, at slíkur dýrur »mekanikkur« krevur stórt viðlíkahald og útskifting tíðum. Slitið av stóru »pákenningunum« er stórt, og minkar effektivitetsurin eisini samsvarandi skjótt við slitaguni.

Nú má berast rætt at

Tí er avgerandi neyðugt, at nú ikki verður framdur leikur, sum ger, at vit mugu koma aftur um aftur ov ofta. Vit hava lært, at tað at seta arbeiði í gongd á slíkum plássi, kostar almikið, so skal samlaði kostnaðurin í Skopun ikki gerast út við 150 mió. kr., er neyðugt at velja skilagott nú.

Hetta er torført við teim náttúruviðurskiftum, sum galda í Skopun, og trygd fyri 100% røttum vali fæst ikki, tað verður altið ein ávís roynd og risiko inni í myndini, men kortini mælir minnilutin til at fremja niðanfyri uppsettu byggiætlan:

1. Ytri Pollur.

Spreinging og dýping eftir projekti nakað størri enn v 1,5, útlegging av gróti fram við landi og til pierstøði, flutningur av avlopsgróti, vega- og brúgvagerðir, ljós og siglingarmerki 22,5 mió. kr.

2. Pierur úr Litlaskeri (25 metrar uttanvert á skerinum) garður suður á brimgarðin, uppfylling innanfyri 10,0 mió. kr.

3. Grótkast uttanfyri molan norðuri á Bergi, 6.000 m³ av kjarnugróti og 7.000 m³ av verjugróti, vegagerð í Høvdahaga 4,5 mió. kr.

4. Hækkaðir einleikaprísir í mun til 1980-projektið 2,5 mió. kr.

5. Møgulig leingjan av molanum norðuri á Bergi 10—15 metrar 10,0 mió. kr.

6. Projektering, eftirlit og økendar útreiðslur 5,5 mió. kr.

Samanlagt 55,0 mió. kr.

Helst er eisini tørvur á heimild til 10% regulering til hvørja síðu, men kann støða takast til hetta, tá byggingin nærkast liðuggerð.

Harmiligt, at málið er drigið út

Mett hevur verið, at tað hevði verið skilagott at arbeitt fyri umleið 10 mió kr. á Pollinum komandi figgjarár. Hetta kann møguliga enn lata seg gera, um arbeiðið verður útboðið beinan vegin, soleiðis at byrjast kann í juni mánaði minnilutin mótmælir tí, at málið er drigið so langt út, at landsstýrið hevur loyvt sær at skerja upphæddina til hetta arbeiðið á figgjarlógaruppskotinum úr 10 mió. kr. niður í 5 mió. kr.

Vegna tess, at helst bert ein partur av kjarnugrótinum til grótkastið uttan fyri molan norðuri á Bergi kemur úr Pollinum, meðan meginparturin av hesum og alt verjugrótið kemur úr Høvdahaganum, eru hesi arbeiði rættiliga óheft hvørt av øðrum og kann tí byggjast fyri samanlagt 15 mió. kr. í komandi figgjarári. Mælt verður tí til, at tær 5 mió. kr., avsettar eru til málið um ferjulegu í Kirkjubø — sum ikki er búgvið at fremja í ár — verða fluttar til gerð av grótkasti í Skopun.


Atli Dam setir tí soljóðandi broytingaruppskot til uppskot landsstýrisins.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at lata dýpa og víðka Ytra Poll í Skopun og har byggja pier o.a., leggja grótkast uttanfyri molan norðuri á Bergi og leingja hann.

§ 2. Heimilað verður eisini landsstýrinum landskassans vegna at læna upp til 55 mió. kr. í samband við fremjingina av teimum í § 1 í nevndu arbeiðum«.

Vantandi kemur málið til 2. viðgerð síðst í hesi vikuni.

jo-mo



Tekningin sýnir havnalagið í Skopun

Projektið til ferjulegu í Kirkjubø ikki búgvið

Figgjarnevndin hevur lagt álit fram í uppskoti landsstýrisins at gera ferjulegu í Kirkjubø. Ein meiriluti — landsstýrisflokkarnir, Tjóðveldisflokkurin og Framburðs- og Fiskivinnuflokkurin — mælir til at minka uppskot landsstýrisins úr átjan niður í trettan milj. kr.

Javnaðarflokkurin mælir til at senda uppskotið aftur til landsstýrið. Javnaðarflokkurin sigur í viðmerkingunum, at tað tykist vera lítið høpi í ferjusambandi ímillum Kirkjubø og Skopun, fyrr enn trygd er fingin fyri, at ferjan fær ligið á øðrum staðnum. Atli Dam, úr Javnaðarflokkinum, sigur í viðmerkingunum:

Tvær reisur hevur tingið lóggivið um bygging av atlogubryggju í Kirkjubø. Fleiri skitsuprojekt eru gjørd, men er ongantið komið til bygging, so helst hevur málið ikki verið búgvið.

Hetta serliga tí at viðurskiftini í teirri havn, Kirkjubøur fremst skuldi hava samband við, ikki hava verið nóg góð soleiðis at ferðamannaskip hevði legu har.

Fyriliggjandi skitsuprojekt er helsur ikki búgvið at fremja. Fyri tað fyrsta av somu grund sum omanfyri nevnt og fyri tað annað tí nærri kanningar ikki eru gjørdar viðvíkjandi hesum projekti.

Tað tykist vera lítið høpi í ferjusambandi ímillum Kirkjubø og Skopun fyrr enn trygd er fingin fyri, at ferjan fær ligið á øðrum staðnum, hesa fáa vit ikki fyrr enn vitað er, hvussu útbyggingin fer at roynast í Skopun, sum helst er havnin, skipið skal liggja í.

Sjálvsagt ber til at skipið liggur í Tórshavn og siglir hagani morgun og kvøld, meðan tað mitt á degi røkir siglingina Kirkjubø—Skopun—Hest—Koltur, men tá er so neyðugt við øðrum fari til Nólsoyar og kenst henda loysn ófullfiggjað.

Kostnaðarmetingin ov leys at samtykkja

Tá so hartil kemur, at landsverkfrøðingurin í figgjarnevndini hevur latið ljóða, at projektið má kannast nærri, og helst broytast, soleiðis at nakað verður sprongt innanfyri pierin úr Árnanesi tí ov grunt er, at brimgangurin á innsiglingina helst verður ov stórur, og at møguliga má spreingjast inn í lendið sunnanvert Árnanes, er metingin um kostnaðin 18 mill. kr. so leys, at tað vildi verið burturvið at samtykt hana nú.

Minnilutin mælir tí til at senda uppskotið aftur til landsstýrið við áheitan um, at landsstýrið letur hetta kanna nærri og projekt gera, sum byggir á haldgóðar metingar — og helst modelroyndir — sum tryggja, at her ber til at hava regluligt ferðasamband fleiri ferðir dagliga við rimiligari trygd fyri regulariteti.